## Hvat halda tit um politisku støðuna?

**Nógv rok hevur verið á tí politiska pallinum teir seinastu dagarnar. Spurningurin um, hvør skal manna komandi samgongu, hevur nærum uttan steðg verið viðgjørdur av fjølmiðlunum her á landi, men mánadagin varð greitt, at sitandi samgongan fer at halda fram hetta valskeiðið eisini. Vit hava hitt fýra fólk á gøtuni fyri fregnast um, hvat vanligi føroyingurin heldur um hetta**

FÓLK Á GØTUNI
*Ragnhild Ellingsgaard*



**Erland Frederiksberg, sølumaður**
Mær hevði dámt best ABC-samgonguna, tí so høvdu vit samstundis fingið eitt nýtt stýri. Nú koyra vit jú við júst tí sama, sum áðrenn valið.

Fólkið hevur jú eisini talað við yvir 50 %, so tað skuldi havt okkurt at sagt.

Harumframt haldi eisini, at løgmaður skuldi havt eina formansrundi, áðrenn avgerðin varð tikin. Tað hevði verið meira demokratiskt.

**Randi Sivertsen, skrivstovulærlingur**
Nú fylgi eg ikki so øgiliga væl við á politiska økinum. Men tá støðan er so jøvn, sum hon er í dag, haldi eg tað vera gott, at verandi samgonga verður sitandi.

Veljarakanningar áðrenn valið vísti jú eisini, at meirilutin av føroyska fólkinum vildi hava Anfinn sum løgmann. So støðan í dag er, eftir mínum tykki, í lagi.





**Karl Birgir Isaksen, stjóri**
Fólkaflokkurin má ikki gevast, og geva skarvin yvir. Teir mugu ómøguligt loyva Sambandsflokkinum framat, tí føroyingar ynskja at halda áfram við sjálvstýristilgongdini og tí búskaparliga vøkstrinum, ið vit hava havt tey seinastu árini.

Hetta gera vit einans við at halda somu kós, sum vit hava gjørt higartil.

**Erikka Elttør, handilskvinna**
Eg haldi ikki, at hetta líkist nøkrum. Fólkið hevur talað, men varð ikki hoyrt, og demokratiið verður als ikki virt í hesum føri.

Sjálv haldi eg, at løgmaður skuldi lagt frá sær.



# Jeanett Debb kemur til Føroya

**Komandi vikuskifti bjóðar liðfelagin hjá Pæturi við Keldu í Hit med Sangen føroyingum í dans við sær**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Nú fríggjakvøldið fer Jeanett Debb at trína pallin í KÍ- høllini í Klaksvík. Saman við henni verða eisini dansarir, og kemur hon at undirhalda klaksvíkingum og øðrum við góðum og løttum popptónleiki.

Flest føroyingar munnu minnast Jeanett frá donsku sjónvarpsrøðini Hit Med Sangen, har hon kappaðist saman við Pæturi við Keldu fyri eini tíð síðani.

Jeanett luttók á Danska Melodi Grand Prixnum, men meir kend man hon vera sum tann, ið átti eyðkennislagið til fyrstu Big Brother-sendirøðina.

Tað er Jan Gardar, sum hevur fingið Jeanett hendavegin.

### Hittust til FCK-dyst

Jan greiðir frá, at alt byrjaði, tá hann var í Danmark og hugdi eftir seinasta Super Liga dystunum í fjør, sum var millum OB og FCK. Úrslitið av dystinum varð, at Todi Jónsson, saman við hinum í FCK, gjørdist danskur meistari. Men eisini okkurt annað úrslit spurdist burtur úr hesum degi.

Jeanett Debb undirhelt í hálvleikinum, og eftir dystin kom Jan á tal við hana. Tá visti hann ikki, at hon seinni eisini skuldi luttaka í Danska Melodi Grand Prixnum.

– Vit prátaðu um tónleik og annað, og eg spurdi hana so, um hon ikki hevði hug at koma til Føroya at framføra, greiðir Jan frá.

Og áhugin var beinanvegin til staðar. Síðani hava tey tosað saman fleiri ferðir, og Jeanett er sera spent til túrin her á klettunum.

– Fyri nøkrum døgum síðani fór hon enntá út og keypti sær fleiri bøkur um Føroyar, so áhugin er í lagi, sigur Jan.



*Jeanett Debb, upphavskvinnan til Big Brother eyðkennislagið, kemur hetta vikuskiftið til Føroyar*

### Tvær konsertir

Tvær konsertir eru á skránni hetta vikuskiftið. Tann fyrra verður í KÍ-høllini fríggjakvøldið klokkan 23.00, meðan tann seinna verður í høllini á Kambsdali leygarkvøldið, eisini klokkan 23.00.

Konsertirnar byrja við klaksvíksbólkinum Chain, sum skal hita áhoyrarnar upp til kendu donsku songkvinnuna.

Jan sigur, at longu nú hevur hann merkt til ein stóran áhuga millum fólk, so hann ivast ikki í, at talan verður um tvey væleydnaði konsert-tiltøk.

# Planta eitt træ í Klaksvík

**Klaksvíkar Kommuna skipar nú aftur fyri tiltakinum »Planta eitt træ«. Hetta er fjórðu ferð, at kommunan fer undir hetta, og hvørja ferð hevur áhugin verið framúr góður fyri tiltakinum**

PLANTA EITT TRÆ
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Klaksvíkar Kommuna ynskir við hesum tiltaki at gera Klaksvíkar bý til eitt grønari umhvørvi.*

**Klaksvík:** Mánadagin fer Klaksvíkar Kommuna at býta trø út til allar klaksvíkingar, sum ynskja at fríðka um urtagarð teirra.

Hetta er nú vorðið eitt afturvendandi tiltak, og hvørja ferð hevur áhugin verið rættiliga stórur.

### Ein grønari býur

Hans Hjalti Skaale, býargartnari, sigur við Sosialin, at Klaksvíkin tey seinastu árini hevur tikið seg alsamt meir fram á tí grøna økinum. Fólk fáa størri og størri áhuga í urtagarðsarbeiði, og fyri at stuðla uppundir hesum hevur Klaksvíkar Kommuna avgjørt, at fara undir tiltakið »Planta eitt træ«, sum vónandi eisini fær Klaksvíkin at gerast ein grønari bý.

– Trø geva lívd, og lívd er sera týðandi í nærumhvørvinum. Tað er gott hjá børnum at spæla, har lívd er, og harafturat gerst býurin vakrari og hugnaligari, sigur Hans Hjalti Skaale.

### 300 pakkar

Leygardagin millum klokkan 10 og 13 kunnu allir klaksvíkingar fara oman í hølini hjá býargartnarinum, sum liggja undir skýlinum við vøllin.

Her fært tú útflyggja eitt útflyggingarskjal, og mánadagin millum klokkan 15 og 18 fert tú so aftur á sama stað við skjalinum og fært síðan útflyggjað ein pakka við fimm trøum.

Trøini í pakkanum eru tvey Siktagrann, ein Loyniviður (ahorn), ein Ylliniviður (hyll) og ein vanlig Rønn.

Klaksvíkar Kommuna hevur fingið útvega 300 pakkar, sum tey síðani býta út millum klaksvíkingarnar.

### Bert ein pakki er til hvørt húski.

Hans Hjalti sigur eisini, at hvørt ár eru allir pakkarnir givnir eftir eini stuttari løtu, so tað ræður um at skunda sær, um ein ynskir at fríðka um urtagaðin við trøum frá kommununi.



# Gongugøtuprát

**Sosialurin var úti í góðveðrinum í gjár, og spurdi fólk, hvat tey halda um politisku støðuna í dag nú løgmaður hevur sagt, at sitandi samgonga heldur fram, og tískil hvørki hevur ein meiriluta ella eina andstøðu, sum er í minniluta**

GØTUPRÁT
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



**Heðin Skarðhamar, bileigari, Havn**
Eg haldi, at tað er hol í høvdið. Løgmaður átti at lagt frá sær, tí hetta skapar eina ótrygga støðu fyri landið. Byrjað skuldi verið heilt av nýggjum



**Gissur Patursson, Havn**
Teir skulu taka seg saman, og gera eitt forrætningslandsstýrið. Tá meini eg við, at teir skulu gera eitt samgonguskjal, har teir leggja dent á Føroyar tey næstu fýra árini, og ikki hugsa so politiskt. Teir eiga at hugsa um, hvat er best fyri Føroyar og fáa landið upp at koyra aftur. Løgmaður var noyddur at gera tað, sum hann hevur gjørt, og tað er júst tí, at teir nú skuldu skipað eitt forrætningslandsstýrið.



**Rannvá Thomsen, krambakvinna, Tvøroyri**
Eg haldi, man fær góðar upplýsningar um politikk í dag, og tí veit man, hvat man skal velja. Men eg dugi ikki rættiliga at svara uppá, hvat eg haldi um politisku støðuna sum hon er nú.



**Benny Ejdesgaard, sølumaður, Havn**
Eg haldi, at tað, sum løgmaður hevur gjørt er nakað tvætl. Hann skuldi lagt frá sær, og gjørt sum fólkið vil. Tá tú hyggur eftir atkvøðubýtinum, so sært tú, at meiriluti var fyri, at verandi samgonga skuldi fara frá. Tí skuldi løgmaður eisini farið frá og lova onkrum øðrum framat, og har hevði ein formansrunda verið eitt gott hugskot.



**Beinta Øssursdóttir, krambakvinna, Havn**
Sjálv eri eg glað fyri, Sambandsflokkurin ikki slapp upp í samgonguna. Hetta er ein undarlig støða, men tað løgmaður hevur gjørt hevur hann rætt til í fylgi stýrisskipanarlógini, og eg haldi, at hann kann verða sitandi. Allar veljarakanningar vísa á, at hann skal halda fram sum løgmaður, og tí hevur hann eisini grundarlag at gera tað, sum hann ger



**Bjørg Hanusson, pedagogur á Virkni, Havn**
Nú eru vit farin at síggja nógvan taktikk í politikki. Eg haldi, at tað er líkamikið um teir fara í gongd við eina formansrundu ella ikki, tí flokkarnir kunnu bert gera eina undirhondsavtalu frammanundan. Sjálv velji eg Tjóðveldisflokkin, og seinast vóru vit størsti flokkur, men vit fingu ongan løgmann. Eg haldi, at samgongan skal royna hetta, og síðani síggja um Javnaðarflokkurin ella Miðflokkurin kemur uppí. Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin hava jú púra ymiskar meiningar, og eg haldi ikki, at tað kann vera rætt, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin melda út, at teir standa saman. Og tað, sum hinir flokkarnir hava gjørt, ger bara, at tað verður blokkur ímóti blokki. Eftir míni uppfatan, so er tað bara Tjóðveldisflokkurin, sum stendur við sítt. Men, at samgongan og andstøðan hava sama tal av tingmonnum er spennandi, og tað ger, at teir verða noyddir at arbeiða saman. Men nú skuldu teir farið í gongd við vallyftini, sum teir hava dyrgt við undan valinum, tí har er nógv at tríva í.

